# Landsfundurin liðugur

**Sambandsfólk siga seg vera klár til valið, nú tey hava hildið landsfund um vikuskiftið**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Sambandsflokkurin hevur hildið landsfund í Lærara-skúlanum um vikuskiftið. Uppmøtingin var so nøkulunda hesar báðar dagarnar. Orakað av, at val verður í næstum, varð landsfundurin framskundaður til at vera um vikuskiftið, har hann vanliga plagar at vera seinna út á várið


*Sambandsmenn og kvinnur hava verið á landsfundi um vikuskiftið*

### Alt við tað gamla

Formansval og næstformansval er á skránni á hvørjum landsfundi hjá Sambandsflokkinum, men hesaferð vóru eingi onnur valevni enn tey bæði, Lisbeth og Alfred.

Tað var sostatt ein einmælt samdur flokkur, sum valdi Lisbeth og Alfred aftur í álitissessirnar.

Lisbeth vann á landsfundinum seinast á Edmundi Joensen, og Alfred Olsen kom eisini í næstformanssessin á sama fundi í fjør.

Lisbeth L. Petersen er, umframt at vera formaður, eisini fólkatingslimur fyri Sambandsflokkin, og tískil hevur ein stór arbeiðsbyrða eisini ligið á herðunum á Alfred.

Tað verður komandi løgtingsval, ið verður mest átrokandi uppgávan hjá Alfred og Lisbeth. Fríggjakvøldið varð tað meira formella avgreitt. Formansval og næstformansval er á skránni hvørt ár, men hesaferð vóru ikki onnur valevni enn tey, ið longu mannað báðar sessirnar. Sambandsflokkurin hevur eisini gjørt nakrar broytingar í stevnuskránni, og hesar vórðu lagdar fram. Størsta broyting var, at føroyska tjóðin nú verður nevnd í stevnuskránni, og hetta fekk eisini nakrar viðmerkingar frá fundarluttakarunum.

### Leygardagur

Tað mesta av leygardagin fór til politiskt orðaskifti. Lisbeth L. Petersen tosaði í sínari formansfrágreiðing mest um fullveldisætlanini, og hon staðfesti støðuna hjá Sambandsflokkinum á hesum økinum. Hon legði eisini fram valuppleggið hjá Sambandsflokkinum, sum er meinlíkt tí, ið varð nýtti til fólkatingsvalið, har ríkisfelagsskapurin verður raðfestur ovast.

Øll lokalfeløgini fingu møguleikan at koma til orðanna. Tað var eitt sindur ymiskt, hvat lokafeløgini høvud upp á hjarta, men spurningurin um almennar stovnar í miðjaðaranum og í útjaðaranum kom fleiri ferðir upp at venda.

Lokalfeløgini í Norðoyggjum og Suðurstreymi hjá Sambandsflokkinum søgdu seg vera ógvuliga væl nøgd við sínar valevnalistar. Hesaferð hevði mann eisini valt at umskipa uppstillingina eitt sindur, soleiðis at bert tey, ið "tíma" komu upp á listan.

Spurningurin um framtíðini hjá Flogvøllinum í Vágum varð eisini reistur av sambandsmonnum í Vágum, og hetta skapti eitt sindur av kjaki,

Annars komu tað ymisk sjónarmið fram frá fundarluttakarunum. Ynski um at koma í samgongu var á hvørjum munni, og fólk høvdu eisini hug til at manna landsstýrið. Eisini elvdi innleggið frá Christian Mejdahl, formanni í tingbólkinum hjá Venstre, til eitt sindur av kjaki.

Í tíðindaskriv, ið varð sent út til fjølmiðlarnar eftir fundin, fegnaðist Sambandsflokkurin um at góða "sambandið" millum Venstre og Sambandsflokkin varð varðveitt. Tað varð eisini víst á, at niðurskurðurin á blokkin hevði havt minni góðar fylgjur fyri Føroyar.

Eitt sindur av práti var um samgong á landsfundinum. Nógv valdømi høvdu longu kannað sær ein landsstýrismann. Tað varð næstan einki tosað um, hvønn tað var ynskiligt at koma í samgongu við, men samanseting millum Tjóðveldis- og Sambandsflokkin tykist ikki serliga sannlík.

Sambandsflokkurin sigur seg vera brynjaðan til løgtingsvalið.


*Leiðslan í Sambandsflokkurin verður verandi tann sama eftir landsfundin síðsta vikuskiftið*

## Flemming takkaði fyri seg

**Flemming Mikkelsen takkaði fyri seg sum tingmaður fyri Sambandsflokkin**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Tað var ein rørdur Flemming Mikkelsen, sum takkaði fyri seg sum løgtingsmaður fyri Sambandsflokkin.

Vágbingurin Flemming Mikkelsen hevur verið tingmaður fleiri ferðir fyri Sambandsflokkin. Hann varð eisini valdur á ting við seinasta val, og hann hevur sitið í tinginum hesi seinastu fýra árini.

Í røðu sínari á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum mintist Flemming aftur á farnar dagar. Hann mintist aftur á, tá ið fyri fyrstu ferð stillaði upp i sjeytiárunum, og hann segði seg hava verið ógvuliga glaður fyri tíðini. Hann mintist eisini sín fyrsta landsfund. Hann segði seg vóna, at Sambandsflokkurin helt fram á somu leið í framtíðini.


*Flemming Mikkelsen var á sínum síðsti landsfundi sum løgtingsmaður.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum, takkaði vegna flokkin Flemming fyri tíðina í flokkinum. Hon roknaði við at síggja hann aftur í sambandshøpi. Landsfundurin fagnaði Flemming við lógvabrestum.



# Bólturin liggur hjá føroyingum

**Umboðið hjá Venstre á landsfundi Sambandsfloksins staðfesti støðuna hjá Venstre í føroyskum málum, og tað var ikki nógv nýtt til sambandsfólk**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Umboðið fyri Venstre á landsfundi Sambandsfloksins, Christina Mejdahl, var síðsti røðarin leygardagin. Siður er, at eitt umboð fyri Venstre er við á landsfundi Sambandsfloksins, og soleiðis var eisini hesaferð.

Hann nýtti tað mesta av røðu sínari til at greiða frá gongdini hjá Venstre og stjórnini í sambandi við seinasta fólkatingsval og politikkin hjá sitandi stjórn í Danmark. Hann undirstrikaði fyri tað nógva tað, ið Anders Fogh Rasmussen hevði ført fram, tá ið hann vitjaði í Føroyum í januar. Føroyingar kunnu sjálvir avgera, hvussu verður við okkara ríkisrættarligu framtíð. Fleiri yvirtøkur merkja minni blokkstuðul, og til endans kann tað vera eingin blokkstuðu, segði Christian Mejdahl.

Hann nevndi eisini oljuna, sum hann væntaði kundi gerast spennandi fyri føroyingar. Hann nýtti eisini høvi til at útgreina fleiri viðurskifti millum Føroyar og Danmark, m.a. hvat blokkurin verður latin til.

Hann gjørdi greitt, at Venstre stuðlar Sambandsflokkinum, og hann vónaði, at Sambandsflokkurin fór at vinna valið og enda í samgongu. Christian Mejdahl ynskti, at Sambandsflokkurin fór at sita í samgongu, soleiðis at minni vekt varð løgd á tað ríkisrættarliga, tí ríkisfelagsskapurin var nakað, ið bæði hann og Venstre eru sinnaði at varðveita.

Christian Mejdahl gjøgnumgekk, hvørja ætlanir um yvirtøkur vóru frammi, og tað vóru eisini fleiri spurningar til hann í hesum sambandi. Hann segði seg bara kunnu rokna við, at føroyingar máttu taka ímóti fløttafólki, nú ætlanir eru frammi um at yvirtaka útlendingamál.



*Christian Mejdahl umboðaði Venstre á landsfundi Sambandsfloksins.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

# Dagført stevnuskránna

**Sambandsflokkurin hevur endurskoðað sína stevnuskrá. Nú er eisini føroyska tjóðin at finna í stevnuskránni**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Á landsfundinum hjá Sambandsflokkinum, sum er í Havn hetta vikuskiftið, varð stevnuskráin hjá flokkinum endurskoðað við tí fyri eygað, at gera nakrar tillagingar.

Gjørdarð vórðu nakrar broytingar, og hesar eru flestar málsligar snúðingar.

Eilif Samuelsen, sum legði broytingarnar fram, segði, at Sambandsflokkurin altíð hevur uppfatað Føroyar sum ein tjóð, og nú er orðið eisini at finna í fyrstu greinini í stevnuskrá Sambandsfloksins. Í viðmerkingunum varð eisini stjórnarligar broytingar nevnt. Hesar skuldu tæna fólkinum best, verður sagt í viðmerkingunum.

Eilif Samuelsen segði eisini, at tað var neyðugt við broytingunum. Hann segði, at fleiri tær somu orðingarnar vórður við, men tað varð sett í annað samband. Fiskivinnan fær framvegis gott rúm í stevnuskránni, og oljan og KT-vinna verða eisini nevnd.


*Eilif Samuelsen legði fram broytingar í stevnuskránni hjá Sambandsflokkinum.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Sum heild varð mest talan um broytingar í orðavalinum. Nøkur meira hóskandi orð vórðu sett í staðin fyri nøkur eldri, men talan var kortini ikki um stórar broytingar.

Jákup Joensen segði í einari viðmerking til broytingarnar í stevnuskránni, at hann vildi hava føroysku tjóðina at standa greitt fleiristaðni. Hann fíltist eisini á, at danskt mál fær so gott pláss í stevnuskránni. Hann helt, at hetta ikki var upp í tíðini, og tað hoyrdi einari farnari tíð til, hóast hann helt tað hava týdning at føroyingar læra danskt.

Eilif Samuelsen greiddi frá, at orsøkin til tað, at føroyska tjóðin varð skift út við føroyska fólkið fleiri staðni í stevnuskránni, skyldast málsligum og praktiskum sneiðingum.

Í sama viðfangi tók Eilif Samuelsen spurningin um danskt mál í skúlum og aðrastaðni í Føroyum upp at venda. Hann helt tað hava stóran týdning, at danskt varð verandi í føroysku skúlunum, og hann helt, at kreftir gjørdu seg galdandi, sum vildu syrgja fyri at forða donskum at festa røtur í Føroyum,

Danskt skal ikki hava nakran fyrimun fram um hini, men tað hevur stóran týdning, at børnini kunnu læra tað, segði Eilif Samuelsen.

Heðin Mortensen saknaði, at ítrótturin ikki fekk nóg nógv rásarúm í stevnuskránni, tí hetta viðgongur so nógvum fólkum.

Eftir nakrar viðmerking afturat varð uppskotið samtykt einmælt.

# Legði upp til valstríð

**Fullveldi var høvuðstemaið í formansfrágreiðingini hjá Lisbeth L. Petersen á landsfundi Sambandsfloksins**

LANDSFUNDUR
*Heri á Rógvi*

Formansfrágreiðingin hjá Lisbeth L. Petersen á landsfundi Sambandsfloksins byrjaði við fullveldinum og endaði við fullveldinum. Fullveldismálið og serliga Tjóðveldisflokkurin fingu av at vita frá forkvinnuni hjá Sambandsflokkinum, men hinir báðir flokkarnir fingu munandi meira vinarlig orð. Hon hevði als einki gott at bera sitandi samgongu og fullveldisætlanini.

Hon kallaði seinasta løgtingsval fyri eitt protestval, har fólk vístu sína ónøgd við bankamálið. Nú skuldi verið ørðvísi, segði hon.

Lisbeth nevndi í røðu sínari fleiri ferðir, hvussu skerjingin av blokkinum hevði ávirkað føroyska samfelagið. Hon vildi vera við, at skerjingin av blokkinum kundi senda føroyska samfelagið út í búskaparligt óskil.

Forkvinna Sambandsfloksins legði eisini fram, hvat Sambandsflokkurin ætlar at fara til val uppá. Valuppleggið hesaferð líkist eisini tí, ið varð nýtt til fólkatingsvalið. Ríkisfelagsskapurin verður raðfest fyrst, tí hetta er treytin til alt annað, metti Lisbeth. Persónliga frælsið og vælferðin verða hini bæði punktini í valupplegginum hjá Sambandsflokkinum.

Lisbeth L. Petersen heitti inniliga á sínar floksfelagar um at leggja alla orku í komandi valstríð.



*Lisbeth L. Petersen tosaði mest um fullveldi í sínari frágreiðing*

*Mynd: Heri á Rógvi*

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

Citroen Jumpy 1,9TD 8 ferðandi
km. 28.200, árg. mars 2000
190.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 101.000, árg. jun. 1998
120.000,-

Citroen Xantia 1,9 TD 5H
km. 94.000, árg. okt. 1996
115.000,-

Citroen Xantia II 2,0 HDi stc. 5H
km. 100.000, árg.sept. 1999
158.000,-

Citroen Xantia Exclusive 3,0 V6
km. 62.500, árg. juni 1998
165.000,-

Citroen Xsara 2,0 HDi stc. 5H
km. 83.000, árg. juni 1999
140.000,-

Mitsubishi Galant 2,0 GTi 4H
km. 170.000, árg. mai 1989
Sýnaður 09'01 50.000,-

Mitsubishi L300 2,5D Vøruvognur
km. 161.000, árg.1994
80.000,-

Mitsubishi Lancer 5H
km. 118.000, árg. juni 1992
Sýnaður 12'01 50.000,-

Fiat Tipo 5H
km. 109.000, árg. mai 1989
Sýnaður 11'01 26.000,-

Ford Escort 1,8D CLX 4H
km. 187.000, árg. nov. 1995
Sýnaður 06'01 45.000,-

Ford Escort 1,8i 16V 5H
km. 80.000, árg. juli 1996
70.000,-

Hyundai Accent 1,3 LS 5H
km. 65.000, árg. feb. 1999
75.000,-

Mazda E2200 Vøruvognur
km. 91.500, árg. mar. 1997
Sýnaður 06'01 95.000,-

Seat Cordoba 1,9 SDi STC. 5H
km. 35.500, árg. Aug. 1999
125.000,-

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ

Vælkomin til
CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311820